## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi ella av ymsum ættum og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin lot av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Upp í hvassan vind av landsynningi og regn, týsdagin minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 11 stig.

Reyði Krossur Føroya savnar inn leygardagin:

# Føroyingar kendir fyri at geva nógv til eyðstødd

**NEYÐHJÁLP**
*Reyði Krossur Føroya*

Leygardagin millum kl 12 og 15 fara sjálvboðin í Føroyum at ganga frá húsi til hús við bússum at savna pengar inn.

Innsavningin skal tryggja, at Reyði Krossur Føroya kann vera við at veita hjálp, eins og vit gjørdu, tá melduróðnin rakti Burma við syndarligum missum.

Innsavningin skal eisini tryggja, at vit til dømis kunnu hjálpa foreldrum og børnum ímóti ti deyðaliga turki, sum høttir suðuri í Etiopia.

Føroyingar eru uttanlanda kendir fyri at vera eitt sera hjálpsamt fólkaslag. Hetta hevur higartil eisini gjørt seg galdandi, tá tað kemur til innsavningar til heimsins illa neyðstaddu medborgarar.

Tá Reyði Krossur Føroya í fjør gjørdi eina líknandi innsavning komu gott 450.000 í bússurnar. Tað svarar til næstan 10 kr fyri hvønn føroying. Til samanbering gav líknandi innsavning í Danmark í 2007 eina uphædd, sum svarar til, at hvør danskari gav 5 kr.

- Eg vóni, at tað føroyska hjálpsemi, sum higartil hevur sermerkt okkum, enn er galdandi. Tað er sostatt mítt stóra ynski, at fólk í ár koyra líka so nógvar pengar í bússurnar sum síðsta ár – ella kanska enn fleiri, sigur formaðurin fyri Reyða Kross Føroya – Suni Vinther.

Pengarnir verða serliga nýttir til at hjálpa neyðstøddum í heimsins vanlukkuøkjum. Eftir tørvi vil Reyði Krossur Føroya geva teir innsavnaðu pengarnar millum annað til arbeiði hjá altjóða Reyða Krossi.

Gevur tú 100 kr. kann Reyði Krossur Føroya til dømis syrgja fyri, at teppir vera latin til fýra flóttafólk.

Gevur tú 150 kr. kunnu vit breyðføða ein AIDS-sjúkan í ein mánaða.

Fyri 260 kr. standa vit aftanfyri útbýting av mati til eitt svøltandi húski við fimm børnum í einum turkuraktum øki í ein heilan mánaða.

Fyri 385 kr. kunnu vit tryggja 35 menniskjum í eini hættisligari støðu reint drekkivatn í ein heilan mánað.

Og fyri 1300 kr kunnu vit tryggja pápa, mammu og børnum teirra, sum flýggja frá einari vanlukku eitt haldgott tjald.




### Tørvur er á tínari hjálp

Reyði Krossur Føroya vantar innsavnarar í serliga Havn og Klaksvík. Um tú brúkar tríggjar tímar av tínari tíð leygardagin tann 4. okt. sum innsavnari, ert tú við til at hjálpa menniskjum, sum eru í djúpastu neyð. Í Havn høvdu vit verið fegin um, at tú møtti í Kommuskúlanum kl. 11.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 20 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 30 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Millum eitt lágtrýst, 978 hPa. yvir Suður-Skandinavia og eitt hátrýst, 1035 hPa. yvir Grønlandi rekur køld luft enn av norði móti Føroyum.



**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer suðureftir og harav viknar høgættin sum frálíður.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/09 kl. 06[00] – 01/10 06[00]. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í oktober: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/09 kl. 06[00] – 01/10 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 0 mm


javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo



Alt um harmonikur



www.simme.eu



Lesið Sosialin


## VESTFALLSKYRRINDI

20. september Mánin næstur jørðini
29. september Tendring
5. oktober Mánin longst frá jørðini
7. oktober Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. okt | 9:22 | 21:45 | 8:22 | 20:45 | 8:37 | 21:00 | 11:22 | 23:45 | 0:00 | 12:22 | 7:37 | 20:00 | 6:37 | 19:00 | 9:37 | 22:00 | 10:37 | 23:00 | 9:07 | 21:30 | 10:22 | 22:45 |
| 3. okt | 10:08 | 22:31 | 9:08 | 21:31 | 9:23 | 21:46 | - | 12:08 | 0:45 | 13:08 | 8:23 | 20:46 | 7:23 | 19:46 | 10:23 | 22:46 | 11:23 | 23:46 | 9:53 | 22:16 | 11:08 | 23:31 |
| 4. okt | 10:55 | 23:19 | 9:55 | 22:19 | 10:10 | 22:34 | 0:31 | 12:55 | 1:31 | 13:55 | 9:10 | 21:34 | 8:10 | 20:34 | 11:10 | 23:34 | - | 12:10 | 10:40 | 23:04 | 11:55 | - |
| 5. okt | 11:44 | - | 10:44 | 23:08 | 10:59 | 23:23 | 1:19 | 13:44 | 2:19 | 14:44 | 9:59 | 22:23 | 8:59 | 21:23 | 11:59 | - | 0:34 | 12:59 | 11:29 | 23:53 | 0:19 | 12:44 |
| 6. okt | 0:08 | 12:30 | 11:30 | 23:53 | 11:45 | - | 2:08 | 14:30 | 3:08 | 15:30 | 10:45 | 23:08 | 9:45 | 22:08 | 0:23 | 12:45 | 1:23 | 13:45 | - | 12:15 | 1:08 | 13:30 |